FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

14. apríl 2025
Mál: 25/08995

Tygara skriv: 52-096/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-096/2024 frá Eyðgun Samuelsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um snarbussin millum Klaksvík og Tórshavn

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kann væntast at túratalið hjá leið 401 úr Klaksvík til Havnar verður økt, so koyrt verður oftari gjøgnum Eysturoyartunnilin?

2. Kann væntast, at leið 400 verður endurskoðað?

Svar til spurning 1 og 2
Tað verður arbeitt við at tillaga leið 401, og nakrar broytingar verða eftir ætlan gjørdar á rutuni millum Norðoyggjar og Suðurstreymoy, tá ið skúlarnir byrja aftur eftir summarfrítíðina.

Sum Strandferðslan áður hevur upplýst, hava sáttmálabundnar útreiðslur og hægri tunnilsgjøld í Eysturoyartunlinum við sær, at broytingar við øktum túratali fara at krevja meirfígging, um tænastan á øðrum leiðum ikki skal skerjast.

Tað er ein avbjóðing fyri Strandferðsluna, at almenna felagsferðslan hjá Bygdaleiðum, sum fer gjøgnum gjaldstunlarnar, skal gjalda fult gjald fyri hvønn buss. Hetta avmarkar smidleikan fyri at nýta eitt nú Eysturoyartunnilin til at betra tænastuna og koyritíðina millum samanbundnu økini. Samskifti er við tunnilsfelagið um hendan trupulleikan. Landsstýrismaðurin vónar, at úrslitið verður ein lægri prísur fyri bussar, sum síðani kann geva betri umstøður at økja um túratalið.

Leið 400 hevur í nógv ár verið mest nýtta farleiðin, og 15 ymiskar bygdaleiðir eru bundnar saman við koyringini á hesu leið. Tí er tað ein trupul uppgáva at gera broytingar á leiðini.

Ein fyritreyt fyri at gera størri broytingar á Bygdaleiðum er tí, at Strandferðslan fær sett nýggja planleggingarskipan í verk. Eftir ætlan skuldi Strandferðslan komið á mál við hesum nú til várs, men orsakað av øðrum átrokandi arbeiðsuppgávum, er hetta tíverri nakað seinkað.

Arbeiðið verður tikið uppaftur eftir páskafrítíðina, og tá ið skipanin er sett í gildið, verður tað munandi lættari at tillaga og broyta verandi ferðaætlanir, og at fáa betri rakstur á Bygdaleiðum.

Hetta, umframt onnur sølufremjandi átøk, fer uttan iva at betra tænastuna og at eggja ferðandi til at brúka almennu flutningstænastuna á Bygdaleiðum.

Jóhan Christiansen
Landsstýrismaður